# Sjálvstøðugt føroyskt bíbliufelag í umbúnað

**Bíbliufelagið hevði fund mánadagin og ovast á breddanum var ætlanin um at seta eitt sjálvstøðugt føroyskt bíbliufelag á stovn. Sum er arbeiða tey undir tí danska bíbliufelagnum, sum er felags fyri alt kongaríkið**



BÍBLIUFELAG
*Solby A. Eliasen*

Enn er ikki nakar dagur ásettur at stovna sjálvstøðugt føroyskt bíbliufelag, men breið semja var á fundinum um, at størri ábyrgd skal verða løgd á føroyingar. Talan er serliga um fíggjarliga partin, at hava egnan búskap at umsita. Her verður hugsað um innsavningarsíðuna og inntøkusíðuna til tess at kunna arbeiða við føroyskum bíbliutilfari, sum samsvarar við endamálið hjá bíbliufelagnum.

Bergur Debes Joensen, prestur og formaður í føroysku bíbliunevndini (nevnd fyri Føroya stift), sigur, at orsøkin, til at eitt sjálvstøðugt føroyskt bíbliufelag nú fer at verða stovnað, er, at skulu vit gagna føroyingum mest møguligt, so er tað av alstórum týdningi at føroyingar verða sum mest við.

– Vit skilja sjálvi best okkara hugburð, og vit eru tey einastu, sum skilja tað føroyska málið, sigur hann.

– Tað er so nógv tilfar í útlondunum, men hvat skal flytast til føroyskt mál, duga vit best sjálvi at avgera, heldur Bergur Debes Joensen og undirstrikar samstundis, at prátið hjá bíbliunevndini um sjálvstøðuggerðing av bíbliufelagnum ikki upp á nakran hátt hevur við tað politiska kjakið um samband ella loysing at gera.

– Koma vit einaferð at hava eitt føroyskt bíbliufelag, har allar kirkjur og samkomur eru við, verður tað sjálvandi í samstarvi við onnur bíbliufeløg úti í heimi – og helst ikki minst við tað danska, sigur hann.

## Bíbliufelagsarbeiði

Danska bíbliufelagið, sum er felags fyri alt kongaríkið, varð sett á stovn í 1814. Tað arbeiðir við at umseta og geva út Bíbliur. Í 1998 varð stovnað ein bíbliunevnd fyri Føroyar. Í henni sita Bergur Debes Joensen, formaður, Marjun Bæk, skrivari, Rasmus Patursson, Bergur Jacobsen og Dánial á Dul Jacobsen fyri Hvítusunnusamkomurnar.

Síðani bíbliunevndin varð stovnað, hava tey arbeitt málrættað við at fáa so nógv bíbliutilfar og annað út á føroyskum.

Bergur Debes Joensen vísir á, at tað í 2000 komu fleiri nýggjar útgávur, men allar við somu umseting, henni hjá Viderø-Dahl.

Tá kom á fyrsta sinni hendan Bíblia við stórari skrift, við elektroniskari útgávu og við eini serligari barna Bíbliu og eini serligari ungdóms Bíbliu. Somuleiðis kom Bíblian á internetið fyrr í vár. Hon kann finnast við at fara inn á www.biblia.fo ella www.bibliufelagid.fo.

Beint fyri framman liggur nú ein ætlan um at fáa Nýggja Testamentið út á ljóðbandi. Og Bergur væntar, at tað møguliga verður veruleiki longu í ár ella fyrst í komandi ári.

Hann greiðir frá, at ein týðandi partur av arbeiðinum hjá bíbliufelagnum, umframt at geva Bíbliur út, er at stuðla bíbliulesnaði. Millum annað verður ein bíbliulesiætlan givin út, sum komandi ár verður send samkomum og kirkjum um landið. Bergur er ikki heilt nøgdur við lesiætlanina og sigur, at tað er ynskiligt at betra um hetta tilfarið.

Eitt triðja, sum tey eisini arbeiða við, er innsavnan av peningi til bíbliuarbeiði í øðrum londum. Seinni í hesum mánaðinum verður ein stór landsinnsavnan, sum fer til bíbliuarbeiðið hjá teimum kristnu í Pakistan.

Bergur Debes Joensen greiðir frá, at bíbliufelagið er limur í Sameindu Bíbliufeløgunum, sum hevur fleiri limir enn ST. Hetta altjóða felagið er ein stuðulsfelagsskapur fyri bíbliuarbeiði um allan heimin.

Bíblian er í dag umsett til 2.260 ymisk mál og yvir 670 aðrar umsetingar eru í gongd.

Øll bíbliufeløg eru felagskristilig. Tað vil siga, at ynski er, at allar kristnar kirkjur og samkomur samstarva.

Í Føroyum er tí innarligt ynski um, at Brøðrasamkoman, sum ger eitt stórt bíbliuarbeiði í Føroym verður við í bíbliufelagsarbeiðinum ein dag.

– Eg síggi fyri mær, at vit ein dag hava eina felags bíbliuumseting, so Føroya fólk kann nýta sama mál í boðan og undirvísing, sigur Bergur Debes Joensen og leggur afturat, at tá so nógvar tjóðir hava megnað tað, so kunnu vit, sum eru ein lítil tjóð, sjálvsagt eisini.

Men hann viðgongur at enda, at tað ikki fer at verða lætt, og tí sigur hann eisini, at báðir partar tá mugu geva seg.



*Mánadagin hevði aðalskrivarin í Danska bíbliufelagnum, Morten Aagaard fund við føroysku bíbliunevndina, bisp og próst*

*Mynd: Jens K. Vang*



# Long bíðitíð eftir hjálpartólum




*- Er tað rætt, at bíðitíðin eftir hjálpitólum í summum førum kann vera meira enn eitt ár, spyr løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, landsstýrismannin, Páll á Reynatúgvu.*

**- Er tað hugsandi, at Hjálpitólamiðstøðini verður álagt at samstarva við privatar útbjóðarar í Føroyum, um hesir skjótari og kanska bíligari kunnu veita ta tænastu, sum brúk er fyri?**
**Løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, heldur, at tað, sum ræður um, er, at brúkarin fær eina góða tænastu og at almenni peningurin, sum verður játtaður til hjálpitól, í mest møguligan mun at kemur brúkarunum til gagns**

HJÁLPITÓL
*Vilmund Jacobsen*

Løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, hevur sett landsstýrismanninum, Páll á Reynatúgvu, ein skrivligan fyrispurning um Hjálpitólamiðstøðina og ta tænastu, sum stovnurin veitir brúkarunum.

Í fyrsta lagi spyr løgtingsmaðurin, hvussu langa bíðitíð, ein brúkari skal rokna við at hava, um hann hevur tørv á einum hjálpitóli, t.d. eini el-song.

– Er tað rætt, at bíðitín í summum førum kann vera meira enn eitt ár, spyr Kári. Í øðrum lagi vísir hann á, at á fíggjarlógini 2001-2002 var játtanin til at økja starvsfólkatalið á Hjálpitólamiðstøðini hækkað eina góða miljón.

– Men er bíðitíðin eftir hjálpitólum stytt munandi í ár av hesi orsøk, spyr hann.

Løgtingsmaðurin vísir í triðja lagi á, at á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, upplýsir landsstýrismaðurin, at Almannaráðið fer í holt við at kanna bygnaðin á Hjálpitólamiðstøðini fyri at staðfesta, um broytingar kunnu gerast, soleiðis at viðskiftafólk fáa eina betri tænastu.

– Kann út frá hesum staðfestast, at verandi tænasta ikki er nøktandi og kann hugsast, at ein slík broyting eisini kann fevna um einskiljing av virkseminum?

Í fjórða lagi vil løgtingsmaðurin hava at vita, um tað kann hugsast, at stovninum verður álagt at samstarva við privatar útbjóðarar í Føroyum, um hesir skjótari ella betur og kanska eisini bíligari kunnu veita ta tænastu, sum brúk er fyri?

## Skjótari avgreiðsla

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, vísir Kári P. Højgaard á, at Hjálpitólamiðstøðin er ein stovnur, sum veitir persónlig hjálpartól til einstaklingar - alt frá avlamisbili, koyristóli, ymiskum sløgum av smærri hjálpartólum til bústaðarbroytingar.

Hann vísir eisini á, at tað finst ein privatfyritøka í Føroyum, ið kann veita somu tænastur sum Hjálpitólamiðstøðin; tað er fyritøkan, Ergo og Hjálpartól.

– Brúkarar hava ført fram, at privati útbjóðarin kann veita eina nógv skjótari avgreiðslu enn tann almenni útbjóðarin, og at hesin somuleiðis kann veita tænastu og upplæring í nýtsluni av hesum amboðum.

Løgtingsmaðurin heldur, at tað, sum ræður um, er, at brúkarin fær eina góða tænastu, og at almenni peningurin, sum verður játtaður til økið, verður nýttur skynsamiliga, so mest møguligt fæst fyri hann.

– Peningurin eigur í mest møguligan mun at koma brúkarunum til gagns, sigur Kári P. Højgaard.

Løgtingið samtykti, 8. november, at landsstýrismaðurin, Páll á Reynatúgvu, skal svara fyrispurninginum hjá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni.

# At gera kommunalar havnir til partafeløg

**- Tá ið tað er loyvt at gera almenn partafeløg í landshøpi, kann tað tykjast løgið, um lóggávan ikki eisini eisini letur upp fyri hesum møguleika hjá kommununum, heldur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður**

HAVNAVIÐURSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*

Løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, hevur sett landsstýrismanninum, Høgna Hoydal, ein fyrispurning um kommunal partafeløg.

Kári spyr, um ein kommuna kann gera eina kommunala havn til partafelag, har kommunan eigur 100% av partapeninginum.

Er svarið játtandi, spyr Kári í øðrum lagi, um henda sama kommuna kann loyva øðrum, t.d. øðrum kommunum, stovnum, feløgum og einstaklingum, at seta partapening í felagið.

## Landsmyndugleikinvelir partafeløg

Í viðmerkingum sínum til fyrispurningin, vísir løgtingsmaðurin á, at landsmyndugleikarnir hava valt partafelagsloysnir í samband við stórar almennar verkætlanir, sum t.d. undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi og undirsjóvartunnilin undir Lerirvíksfirði.

– Føroya Tele er umskipað til partafelag, og landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur boðað frá, at ætlanin er, at Postverk Føroya eisini skal gerast til alment partafelag, sigur Kári P. Højgaard.

Tað hevur mangan verið ført fram, sigur løgtingsmaðurin, at hesin háttur er neyðugur fyri at kunna kappast á jøvnum føti við privata arbeiðsmarknaðin.

– Um møguleiki er fyri at selja ella nýtekna partabrøv, kann kommunan fáa kapital uttanífrá til víðkan og nýíløgu, og hetta kundi ført til stóra menning fyri økini, oyggjarnar og landið, heldur løgtingsmaðurin.

## Kunnu ikki flytast

Kári stúrir fyri, at við verandi gongd, verður tað helst bara tann eina havnin, sum fær møguleikar fyri útbygging í framtíðini, tí størsti parturin av inn-og útflutninginum fer fram yvir eina havn í landinum.

– Eg dugi ikki at síggja nakran vanda í, at aðrir enn kommunan kunnu eiga upp til 49% av eini havn, tí havnaløgini kunnu ikki flytast kortini, men vera liggjandi sum eitt aktiv.

Við atliti til eina komandi oljuvinnu, vísir løgtingsmaðurin á, at eingin kommuna í landinum einsamøll verður før fyri at gera tær íløgur, sum eru neyðugar fyri, at útgerðarhavnin kann nøkta komandi tørvin.

Løgtingið samtykti, 8. november, at skrivligi fyrispurningurin hjá Kára P. Højgaard til Høgna Hoydal, landsstýrismann, skal svarast.



*– Í eini komandi oljuvinnu, verður eingin kommuna í landinum einsamøll før fyri at gera tær íløgur, sum eru neyðugar fyri, at ein útgerðarhavn kann nøkta komandi tørvin, sigur løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, sum hevur spurt Høgna Hoydal, landsstýrismann, um kommunalar havnir kunnu gerast til partafeløg.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*